Starvsmannafelagið fer at krevja limagjald. Formaðurin:

Ikki mist maskinmeistararnar

Starvsmannafelagið hevur ikki mist maskinmeistararnar, metir formaðurin, Erns Hansen.

Hann sigur, at nú Strandferðslan hevur fingið boð ikki at afturhalda limagjaldinum, má felagið sjálvt innkrevja tað.

Hóast maskinmeistararnir hava meldað seg úr Starvsmannafelagnum, eru teir sáttmálabundnir gjøgnum tað.

Ernst Hansen vísir á, at sáttmálin millum Starvsmannafelagið og landsstýrið greitt sigur, at hann m.a. fevnir um maskinmeistararnar við Strandferðsluni.

— Skal nakað broytast í sáttmálanum má hann brótast. Eg trúgvi ikki, at landsstýrið kann bróta hann, tí so fellur allur sáttmálin á gólvið. Og so koma vit í eina konfliktstøðu, sigur Ernst Hansen.

Ikki brúka sáttmála uttan tilknýti

Ernst Hansen metir ikki, at landsstýrið hevur brotið sáttmálan, men hann setur spurnartekin við, um starvsmannafelagið kann góðtaka, at nakrir limir nýta ágóðan av sáttmálanum — lønarliga og arbeiðsliga — uttan tilknýti til felagið.

Strandferðslan skal ikki afturhalda limagjaldinum. Hevur landsstýrið ikki so óbeinleiðis góðtikið útmeldingina?

— Nevndin í Starvsmannafelagnum hevur fullmakt at gera avtalur við stovnarnar um at afturhalda limagjaldinum av praktiskum orsøkum. Er eingin avtala, mugu vit sjálvir innkrevja tað. Og vit vóna at fáa tað frá maskinmeistarunum, so vit sleppa undan at gera nakað.

— Um meistararnir ikki vilja gjalda?

— Tað kann eg einki siga um enn. Fáa vit einki limagjald, og teir fáa at vita, at teir ikki eru í felagnum, eru teir sáttmálaleysir. Tá kunnu teir ikki siga, at teir eru løntir eftir starvsmannasáttmálanum, tí ta treyt krevja vit, at limaskapur krevst, um sáttmálin skal brúkast.

Landsstýrið hevur álagt Strandferðsluni at afturhalda limagjaldið!

— Tað mugu Strandferðslan og landsstýrið klára sínámillum.

Draga ikki limir

Fleiri fakfeløg vilja vera við, at tit draga limir til tykkum?

— Nei, men tey sum verða sett í alment starv eftir okkara sáttmála, mugu gerast limir í Starvsmannafelagnum. Og øvugt, fer nakar úr okkara øki inn á t.d. handverksøkið, fer eitt skifti av fakfelag fram. Men tað vísir seg, at hini feløgini skilja ikki, at tá onkur kemur frá teimum og inn á okkara økið, at viðkomandi má gerast limur í Starvsmannafelagnum.

— Respektera tit hini fakini?

— Ja, fullkomiliga. Arbeiðir t.d. ein handverkari handverkara-arbeiði innan tað almenna, krevja vit ikki limaskap í Starvsmannafelagnum, sigur Erns Hansen at enda.

Seinasta »magnið« komið

Vit vera eitt blað fátækari í tí nýggja árinum. Myndablaðið Magn kemur ikki útaftur. Seinasta eintakið — jólablaðið — er komið.

Magn er komið út í fýra ár. Tað eru teir báðir ljósmyndararnir Kalmar Lindenskov og Alan Brockie, sum hava givið blaðið út. Um helvtina av útkomutíðini hevur Randi Jacobsen, tíðindakvinna, havt skrivingina um hendi.

Magn hevur lagt dent á tað meira seriøsa í tilveruni. Tað hevur við frálíkum reportasjum greitt frá tí dagliga degnum hjá pørtum av fólkinum — frá nógvum av tí, sum vit ikki góvu okkum far um.

Bygdasøgan hevur verið ein fastur táttur í blaðnum og hann man hava givið mongum eina kunning um tær ymisku bygdirnar.

Men Magn hevur eisini verið avdúkandi í fleiri førum. Hvør minnist ikki »Mjørkadalsgøluna« og skotvenjingarnar eftir menniskja-dukkum hjá politinum, sum politiið avnoktaði?

Eingin ivi er um, at Magn hevur verið eitt tað mest fullkomna blaði, sum er komið út í Føroyum. Tað veri seg í myndum, skriving og útsjónd.

Tí er tað stórt spell, at blaðið ikki orkaði meira. Fíggjarliga grundarlagið var ov lítið. Einans smá 1000 eintøk meira — og útgávan var ikki steðgað.

Men fólkið — lesarin — valdi.

jo-mo

Sumbingar syngja um Svartafoss

Tveir sumbingar, Georg og Ronnie, góvu fyrradagin eina single-plátu út.

Tey bæði løgini eru Svartifossur eftir Hans A. Djurhuus og Mama eftir Ronnie. Til Svartafoss hava teir brúkt eitt norskt lag, sum Georg hevur broytt nakað, meðan Ronnie eisini hevur gjørt lagið til Mama.

Tað er LM-handilin, sum gevur plátuna út, meðan Milson Zachariassen hevur tikið hana upp.

Upptøkan er gjørd í summar og ætlanin var, at plátan skuldi koma út til ólavsøku, men hon varð seinkað.

Georg og Ronnie spæla og syngja sjálvir a-lagið, meðan Milson eisini luttekur við steelguitar á b-lagnum.

Georg og Ronnie hava spælt saman í fleiri ár í bólkinum Fire Star. Nú spælir Ronnie við Black Birds, meðan Georg syngur við ymiskum bólkum.

Gjøgnum luftina **SWAN kapping** Eftir sjónum



Allar staðir, har bakað verður, brúka tey SWAN

Við at baka enn meira við SWAN kunnu tygum nú vinna:

1. vinningur
Eina rundferð fyri tvey Føroya - England - Danmark - Føroyar við Bliki.

2. vinningur
Eina flogferð fyri tvey Føroya - Danmark - Føroyar.

Drigið verður 1.3.1980.

– – – – –

Eyka vinningur:
hvønn mánað (desember 1979 - januar-februar 1980) 10 vinningar á 10 pk. SWAN hveitimjøl.

Sendið so nógv SWAN-merkir sum gjørligt inn til:

SWAN
Postbox 16
3800 Tórshavn

kring oyggjarnar

Sjálvval til fleiri lond

Tann 1. januar 1980 kunnu føroyingar ringja beinleiðis til sjey lond afturat, Cypern, Jugoslavia, Portugal, Tjekkoslovakia, Turkaland, Gibraltar og Malta.

Í telefonbókini stendur, at væntandi verður sjálvval til hesi londini í lagi á sumri 1978. Hetta hevur drigið út, men nú er tað komið undir land. Og nýggjársdag kann ein snara okkur nummar heilt yviri í Turkalandi og ynskja gott nýggjár.

Hey øll føroysk børn

er heitið á nýggjari barnabók, ið beint nú er útkomin.

Tað eru føroysk børn, sum hava skrivað og teknað myndirnar, ið eru í litum.

Bókin er 48 blaðsíður og kostar um 30 kr.

Savnað tilfarið og givið út hava Anna Brimnes, Johanna C. Mørkøre og Ingrið Sondum.

Skipið stevnir fram á leið

er heitið á bók, sum er komin út í vikuni.

Bókin er skrivað av kenda norska rithøvundanum Nordahl Grieg. Týtt hevur Árni Dahl.

Bókin, sum er 160 síður, kostar 58 kr.

Janus á nýnorskum

»Færøyske Dikt« av Janus Djurhuus, eitur nýggj bók, sum er komin í bókabúðirnar nú beint fyri jól. Tað er norðmaðurin, skaldið og málfrøðingurin, Ivar Orgland, sum hevur megnað at týða fleiri av yrkingunum hjá Janusi Djurhuus til nýnorskt mál.

Hetta er áhugaverd bók, sum uttan iva vil vera við til at visa norrønu grannum okkara, hvussu stór skald Føroyar hava fostrað.

Bókin er 325 blaðsíður. Hon kostar innbundin 128 kr. og útgevari er forlagið Fonna. Útgávan er stuðlað av Norrøna Ráðnum.

Plastposanýtslan skal minkast

Føroya Keypssamtøka hevur sett sær fyri at minka um nýtsluna av plastposum.

Stjórin í FK metir, at nýtslan hevur fingið yvirhond og harafturat fremur hon oysl og dálkar.

Tí fer FK eftir nýggjár at taka pening fyri posarnar. Onnur hugskot hava verið, men royndir aðrastaðni vísa, at munabesti mátin at minka um nýtsluna, er at taka fyri plastposarnar.

Timburprísirnir upp í 1980

Tað kann roknast við, at prísirnir á timburi o.t. fara at hækka munandi í 1980.

Nú er meira enn eitt hálvt ár síðani timburprísirnir hækkaðu. Síðani tá er tollurin hækkaður við 2% og svenska krónan er uppskrivað við 5%. Harafturat eru hendar broytingar í prísunum.

Meginparturin av føroyska timburinum kemur úr Finnlandi og Svøriki.

Prísráð Føroya upplýsir, at teir enn onga umsókn hava fingið frá timburhandlunum um at hækka prísin.

Stjórin í Timburhandlinum, Eivind Fossá, sigur, at tað er givið, at alt fer at hækka í komandi ári, men hann veit ikki nær og hvussu nógv prísirnir á timbri og øðrum tilfari fara at hækka.

Løgmaður:

Lítlar vónir um tosk næsta ár

— Eg havi ikki góðar vónir um, at vit fáa tosk undir Grønlandi næsta ár.

Hetta segði Atli Dam, løgmaður, á tingfundi hósdagin. Hann segði, at vísindamenn hava mælt til, at TAC fyri tosk við Grønland verður 0 í 1980. Grønlendingar sleppa tó at veiða tosk, men EEC og ríkisstjórnin hava eftir ynski frá grønlendingum góðtikið, at ongin annar sleppur at royna eftir toski næsta ár.

Spurningurin um føroysku toskaveiðuna verður tikin upp aftur á fundi við ríkisstjórnina fyrst í januar, upplýsti løgmaður. Allir flokkar verða umboðaðir á hesum fundi.